Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er fyrisiting av persónsupplýsingarlógini

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki, sum vísir til Løgmansskrivstovuna.

Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu og hevur eftirlit við allari viðgerð, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum fevnir um.

Dagliga virksemi hjá Dátueftirlitinum verður røkt av avgreiðsluskrivstovuni. Ráðið, sum landsstýrismaðurin setir, er skipað við formanni og 2 øðrum limum..

Eftirlitið hevur av sínum eintingum ella eftir klagu frá einum skrásettum eftirlit við, at øll viðgerð, sum lógin fevnir um, bert fer fram í samsvari við lógina..

Av øðrum uppgávum kann nevnast vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum viðvíkjandi skráseting og víðarigeving av persónsupplýsingum, viðgerð av klagum og málum, sum ráðið av sínum eintingum hevur tikið upp, og viðgerð av fráboðanum og umsóknum um loyvir.

Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum hjá almennum myndugleikum og hjá privatum.

Dátueftirlitið skal geva ummæli til ætlaða løggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum og annars virka fyri góðum dátuviðgerðarsiði.

# Fulltrúi til Dátueftirlitið

Við hesum verður søkt eftir fulltrúa til skrivstovuna hjá Dátueftirlitinum.

**Uppgávur**
Viðkomandi hevur dagligu leiðsluna og ábyrgdina av Dátueftirlitinum. Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna um málsviðgerð, vegleiðing og ráðgeving, fundarfyrireiking og luttøku á ráðsfundum, umframt kunnandi virksemi herundir dagføring av heimasíðuni við kunnandi tilfari og gera ársfrágreiðing.

**Fakligt førleikakrøv**
Viðkomandi skal vera útbúgvin løgfrøðingur.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Viðkomandi skal hava hug og evni at arbeiða sjálvstøðugt og evni skrivliga at málbera seg lýtaleyst á føroyskum. Kunnleika til edv á vanligum brúkarastøði krevst.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Turið D. Hentze, forkvinnu í dáturáðnum tlf. 311460 fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Dátueftirlitinum
Tinganes
Postboks 64
110 Tórshavn

og skulu vera Dátueftirlitinum í hendi í seinasta lagi 14. mars 2003.

Kunngerð

## Barsilspeningur av lønarinntøku frá útlendskum arbeiðsgevara

Sambært kunngerð nr. 6 frá 23. januar 2003 hava løntakarar við inntøku frá útlendskum arbeiðsgevara nú møguleikan at tekna eina sjálvbodna trygging, sum gevur teimum rætt til barsilspening av hesi inntøku.

Umframt kravinum um fastan bústað og fulla skattskyldu í Føroyum, eru rættindini til omanfyri nevndu trygging treytað av lønarinntøku, sum sambært § 61 í skattalógini ikki verður roknað sum A-inntøka í Føroyum, t.v.s. inntøka frá útlendskum arbeiðsgevara, sum ikki hevur heimting í Føroyum.

Tryggingin skal hava verið í gildi 1 ár, áðrenn løntakarin hevur rætt til útgjald tó soleiðis, at tey, sum hava verið í barsilsfarloyvi í tíðarskeiðnum eftir 1. juni 2001 og til 25. januar 2003, og sum í seinasta lagi **mánadagin 24. februar 2003** skrivliga venda sær til Barsilsskipanina og tekna omanfyri nevndu trygging, kunnu fáa útgjald við afturvirkandi gildi.

Barsilsskipanin

Smyrilsvegur 20 · postsmoga 3025 · 110 Tórshavn · Tel 353 555 · Fax 353 556 · www.barsil.fo · barsil@barsil.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

## Skeiðsdepilin við Marknagil – SDM

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

**Starvsfólkarættur I 4. og 5. mars**
**Starvsfólkarættur II 2. og 3. apríl**
**Fíggjarskipan Landsins 17. og 18. mars**

Frálæran er skipað sum fyrilestrar, kjak og bólkarbeiði, har ítøkilig mál verða loyst.
Skeiðini eru serliga ætlað til fólk í almennu fyrisitingini.

**Starvsfólkarættur I**
- setanarsløg og -mannagongdir, -skriv, løn
- arbeiðstíð - leggja frítíð til rættis, frávera, sjúka, barnsburður og farloyvi
- reglur í samband við uppsøgn
- grundleggjandi fyrisitingarligar reglur í samband við starvsfólkaviðurskifti

**Starvsfólkarættur II**
- starvsmannalógin, frítíðarlógin, tænastumannalógin, javnstøðulógin, lóg um alment innlit, fyrisitingarlógin, týðandi avtalur og sáttmálar á økinum.
- hvussu verða trupulleikar loystir, t.d. broytingar í starvsinnihaldi, sjúka, frítíð, agamál og uppsøgn

**Fíggjarskipan Landsins**
- at fáa eina vitan, sum kann nýtast í samband við arbeiðsuppgávur, sum hava við landsins fíggjarskipan at gera
- at fáa yvirlit yvir mannagongdir og reglur, sum galda fyri arbeiði við at gera tilfar til fíggjarlógaruppskot.

**Stað:** Starvsfólkarættur I og II á Hotel Vágum, vistarskeið
Fíggjarskipan Landsins á Hotel Tórshavn, dagskeið
**Skeiðleiðari:** Thomas Magnussen, cand. jur. o.a.
**Tilmelding:** **Skeið I áðrenn 26. februar 2003**
**Skeið II áðrenn 25. mars 2003**
**Fíggjarskipan Landsins áðrenn 10. mars 2003**

Skeiðini verða hildin treytað av, at nóg nógvir luttakarar tekna seg.

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374
t-postur dt@post.olivant.fo

Kølimontørur
&
Elektrikari
søkjast til
fjølbroytt arbeiði
hjá
EYÐUN JESPERSEN
Tlf. +298 314547 • Fax: +298 319923 • E-mail: pjej@post.olivant.fo

Vikuskifti
Nr. 37 • leygardagur • 22. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Anne Grete ein kontant kvinna

Men hvør er hendan kvinnan, sum fyri góðum trimum árum síðan varð sett í starv sum læknastjóri á Landssjúkrahúsinum?



Lesið síðu 7



*Børnini í útibarnagarðinum hugna sær, meðan tey mála tunnurnar*

# Føstulávint er í hondum

Føstulávint er ein hugnalig og stuttlig tíð hjá børnunum. Tey njóta at kunna klæða seg út og mála seg, so ongin kennir tey aftur. Men ikki minst gleða tey seg til at sleppa at sláa tunnu. Í útibarnagarðinum, Útistova, málaðu tey tunnur ein dagin Sosialurin kom framvið

FØSTULÁVINT
*Solby A. Eliasen*

– Vit mála tunnur, sigur ein drongur í somu løtu, vit koma inn um portrið.

Fimm tunnur standa uttanfyri lítla, gamla skótahúsið úti í Grøv. Tunnurnar eru komnar frá JF Kjølbro Heilsølu. Tey hava nú í nøkur ár latið barnagørðum tunnur at mála. Tær skula nýtast til at stilla út.

Nógvir ymiskir og sterkir litir eru í skálunum, og børnini sita íðin í svørtum plastiksekkum og mála. Men ikki bara tunnurnar verða málaðar, til tíðir sletta tey niður á seg og onkuntíð kann onkur armur vera fyri, so at málingin endar á eini ermu í staðin fyri á tunnuni. Men tað ger onki, tí málingin fæst av við at vaska hana. Veðrið er gott henda dagin, ikki so kalt — fitt av vindi kortini. Men tað letur ikki til at gera nakað fyri børnini, sum sita so hugagóð og mála.

– Genturnar fara at mála eina kettu, greiðir ein smágenta frá, meðan hon tekur ein pensil í hondina.

Í Útistovu eru tey so smátt byrjað at fyrireika seg til føstulávint. Tann eina dagin høvdu tey málað seg sjálvi. Har vóru kettusnýð, hundasnýð og mong onnur. Flestu børnini vóru ikki til at kenna aftur. Tey 14 børnini gleða seg avbera nógv.

Tey sláa vanliga pott í Útistovu. Tey plaga at sláa ein beint uttanfyri og ein niðri í gamla svimjihylinum. Í fjør hevði leiðarin, Anni Joensen, lagt eitt skattakort inn í pottin í staðin fyri bomm, og so fóru tey øll á skattajakt, tá potturin var brotnaður.

– Eg haldi, at teimum dámar væl at sláa pott. Tað gera vit, tí tað var gamalt, heldur enn at sláa tunnur, greiðir Anni frá og leggur afturat, at tunnusláttur verður fyriskipaður so nógva staðni til føstulávint, so børnini fáa fleiri ferðir høvi til tað, hóast tey ikki gera tað í barnagarðinum.

Hetta at tey hava fingið tunnur til vega er ein liður í arbeiðsháttinum í útibarnagarðinum.

– Tað eitur "den integrerede baggrund", greiðir Anni frá. Tað merkir, at samstarvið millum heim og stovn er sera tætt. Tað royna tey við millum annað at biðja børnini um at hava ymiskt við heimanífrá, um tað manglar á stovninum.

– Um okkum til dømis mangla seym ella hamara, so spyrja vit børnini, um tey kunnu læna heimanífrá og hava við næstu ferð, sigur Anni, sum letur væl at hesum arbeiðsháttinum. Børnini eru errin, tí tey sleppa at taka eitt hvørt við frá heiminum.

Eisini hava tey verið og vitjað fleiri av arbeiðsplássunum hjá øðrum av foreldrunum hjá børnunum. Hetta er eisini nakað, sum børnini halda er sera stuttligt. Til dømis hava tey verið á einum bakaríi og á einum alibrúki.

Men fyri durum stendur nú føstulávint, og tá vit fara avstað aftur, sita børnini enn í sama lag so hugagóð og mála úti í vindinum.